# Hørð kapping millum feløgini

*Øll feløgini fingu heiðursmerki tá Føroya Fimleikasamband skipaði fyri FM í reiðskapsfimleiki í høllini á Hálsi fríggjadagin og leygardagin.*





*Kappingin dýra biðjudag og leygardagin var fyri lið, og einstaklingar í teimum eldru aldrusbólkunum, 14-15 ár og 16 ár og eldri í reiðskapsfimleiki, og fór hetta fram í høllini á Hálsi.*



Kappingin var fyri lið og einstaklingar í teimum eldru aldursbólkunum, og luttakandi feløgini vóru Støkk, Havnar Fimleikafelag, Ljósið og Fok.

Kappast var í trimum ymiskum greinum í bæði lið- og einstaklingakappingini í vikuskiftinum. Genturnar kappaðust í lopi, gólvíðkan og á bita, meðan dreingirnir kappaðust í ringum, á gólvi og í lopi. Uml. 30 fimleikarar luttóku í kappingini, og ikki kann sigast annað enn at kappingin gekk væl.

### Støkk og Ljósið sterkast hjá kvinnum

Í kappingini hjá gentum í bólki 3 var tað Ljósið, sum vann bæði lið- og einstaklingakapping. Hetta var eitt javnt og gott lið úr Ljósinum, men ein sum skaraði framúr var tó Susan P. Olsen, sum eisini endaði á fyrsta plássi í einstaklingakappingini. Í tí elsta bólkinum hjá gentum vann Støkk á einum samansettum liði úr HF og Ljósinum, og í kappingini fyri einstaklingar vann Marit Magnussen úr Støkk sannførandi í øllum greinum.

## Úrslit, einstaklingakapping

**Gentur, bólkur 3**

**Lop:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Marjun Persson | HF | 7,10. |
| 1 | Maiken Thomsen | HF | 7,10. |
| 3 | Susan P. Olsen | Ljósið | 6,95. |

**Gólv:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Marjun Persson | HF | 7,20 |
| 2 | Susan P. Olsen | Ljósið | 6,50 |
| 3 | Maiken Thomsen | HF | 6,45 |

**Biti:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Susan P. Olsen | Ljósið | 7,35 |
| 2 | Vígdis H. Olsen | Ljósið | 7,10 |
| 3 | Maiken Thomsen | HF | 7,00 |

**Samanlagt:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Susan P. Olsen | Ljósið | 20,80 |
| 2 | Maiken Thomsen | HF | 20,55 |
| 3 | Marjun Persson | HF | 20,00 |

**Gentur, bólkur 4**

**Lop:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Marit Magnussen | Støkk | 7,35 |
| 1 | Marina Moraitis | HF | 7,35 |
| 3 | Anita Knudsen | Støkk | 7,10 |

**Gólv:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Marit Magnussen | Støkk | 8,40 |
| 2 | Marina Moraitis | HF | 7,25 |
| 3 | Anita Knudsen | Støkk | 7,00 |

**Biti:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Marit Magnussen | Støkk | 7,40 |
| 2 | Torgerð H. Olsen | Ljósið | 7,30 |
| 3 | Durita Knudsen | Støkk | 7,10 |

**Samanlagt:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Marit Magnussen | Støkk | 23,15 |
| 2 | Marina Moraitis | HF | 21,30 |
| 3 | Anita Knudsen | Støkk | 20,70 |

**Dreingir, bólkur 3**

**Lop:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Poul E. Hanusarson | Støkk | 7,28 |
| 2 | Heini H. Johansen | HF | 7,20 |
| 3 | Jóannes Lamhauge | Støkk | 7,08 |

**Gólv:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heini H. Johansen | HF | 8,05 |
| 2 | Poul E. Hanusarson | Støkk | 7,85 |
| 3 | Petur Joensen | Støkk | 6,85 |

**Ringar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heini H. Johansen | HF | 9,35 |
| 2 | Poul E. Hanusarson | Støkk | 8,95 |
| 3 | Jóannes Lamhauge | Støkk | 8,00 |

**Samanlagt:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Heini H. Johansen | HF | 24,60 |
| 2 | Poul E. Hanusarson | Støkk | 24,08 |
| 3 | Jóannes Lamhauge | Støkk | 21,83 |

**Dreingir, bólkur 4**

**Lop:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Rúni Lamhauge | Fok | 7,45 |
| 2 | Magni Jacobsen | Støkk | 7,35 |
| 3 | Høgni H. Andersen | HF | 7,28 |

**Gólv:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Gutti Harryson | HF | 9,10 |
| 2 | Magni Jacobsen | Støkk | 8,70 |
| 2 | Eyvind A. Hansen | HF | 8,70 |
| 2 | Rúni Lamhauge | Fok | 8,70 |

**Ringar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Eyvind A. Hansen | HF | 9,40 |
| 2 | Gutti Harryson | HF | 9,35 |
| 2 | Høgni H. Andersen | HF | 9,35 |

**Samanlagt:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Gutti Harryson | HF | 25,68 |
| 2 | Eyvind A. Hansen | HF | 25,33 |
| 3 | Høgni H. Andersen | HF | 25,08 |



## Úrslit, liðkapping

**Dreingir, bólkur 3**

1 Støkk 57,71
Liðið: Jóannes Lamhauge, Petur Joensen, Fróði Jensen

**Dreingir, bólkur 4**

1 Havnar Fimleikafelag 73,75
Liðið: Heini í Dali, Heini H. Johansen, Gutti Harryson, Høgni H. Andersen, Eyvind A. Hansen

2 Støkk/Fok 73,01
Liðið: Poul Esbern Hanusarson, Magni Jacobsen, Heri S. Lamhauge, Rúni Lamhauge

**Gentur, bólkur 3**

1 Ljósið 58,35
Liðið: Unn Kragesten, Birita K. Nielsen, Susan P. Olsen, Vígdis H. Olsen

2 Havnar Fimleikafelag 53,95
Liðið: Marjun Persson, Maiken Thomsen, Annika R. Gjógvará, Jóna Jóhannesen

3 Støkk 50,50
Liðið: Jónvá Joensen, Ann Mari Róin Johannesen, Lív Poulsen

**Gentur, bólkur 4**

1 Støkk 64,70
Liðið: Anita Knudsen, Marit Magnussen, Durita Knudsen, Anna Hansen

2 Ljósið/HF 60,35
Liðið: Joan Samson, Tórgerð H. Olsen, Marina Moraitis, Mia Káradóttir





*Hørð kapping var um heiðursmerkini millum tey fýra fimleikafeløgini, Støkk, Ljósið, HF og Fok. Kappast varð í trimum ymiskum greinum hjá bæði monnum og kvinnum, og serliga stuttligt var síggja gólvíðkanina hjá kvinnum, sum nú verður framførd saman við tónleiki*

***Myndir: Sofus Johannesen***

### HF stóð seg best hjá monnum

Liðkappingin í bólki 4 hjá monnum var sera jøvn millum HF og eitt samasett lið millum Støkk og Fok, men HF megnaði tó at fara avstað við sigrinum serliga tí at teir vóru sterkari í ringunum. Í einstaklingakappingini sást eisini týðiliga at HF hevur ein breiðari hóp, sum klárar seg væl í øllum greinum, tí HF endaði samanlagt sum nr. 1, 2 og 3.

### Kappingin gekk væl

Í ár var kappingin skipa øðrvísi enn undanfarin ár, tí kappast var fyri fyrstu ferð eftir altjóða reglum nevndar F.I.G. Harafturat var meira gjørt við at gera kappingina áskoðaravinarliga. Hetta varð skipað soleiðis, at sohvørt sum ein bólkur var liðugur við eitt amboð, varð marsjerað hátíðarliga yvir til næsta amboð. Sjálvt um kappingin altíð verður eitt sindur drúgv, keddi áskoðarin seg ongantíð, tí øll amboðini vóru nýtt megin-partin av tíðini.

